VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi og regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið hósdagin:
Fyrrapartin lot til andøvsgul av suðri og stundum regn, men seinnapartin útsynningur og kanska okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

3 minuttir úr Havn til Nólsoyar

Seinnapartin mánadagin fóru teir báðir djørvu garparnir, Atli og Sveinur, sum ætla at sigla til Danmarkar á vatnskutara, teirra fyrstu royndartúrar við maskinunum, sum komu til landið mánamorgunin

ROYNDARTÚRUR
Solby A. Eliasen

Atli S. Petersen á vatnskutaranum í fullari ferð á Kaldbaksfirði mánadagin. Maskinan hevur 185 hestar og 1500 cc. Hon kann sigla við upp til 75 mílaferð
Mynd: Jens K. Vang

Vatnskutararnir komu til landið við Norrønu mánamorgunin. Og seinnapartin klokkan trý sjósettu teir maskinurnar fyri fyrstu ferð. Hetta hendi á Argjum.

Eftir at hava roynt tær eina lítla løtu á Havnarvág fóru teir víðari við teimum. Teir tóku tíð fyri at vita, hvussu langa tíð tað tók at sigla av Argjum til Nólsoyar.

– Eg hugdi at klokkuni hjá mær, tá eg fór avstað. Setti fulla ferð á, og burturs æð frá tí, at hon fleyg einar tvær ferðir úti á firðinum, so gekk tað fint, og júst tríggjar minuttir seinni var eg í Nólsoy, greiðir Atli frá.

Hann og Sveinur royndarsigldu maskinurnar í nærum átta tímar mánadagin, so hann viðgongur, at hann var nakað eymur í kroppinum dagin eftir.

Atli sigur, at teir høvdu vónað at kunna gera túrin áðrenn Ólavssøku, men teir hava hugt at streymviðurskiftunum í Føroyum. Og talvan vísir, at bestur viðurskiftini eru tann 23. juli, og tá náa teir ikki at verða aftur í Føroyum á Ólavsøku, so teir hava gjørt av, at teir fara ikki fyrr enn eftir Ólavsøku.

– Vit hava eisini brúk fyri at gera hetta eitt sindur størri og marknaðarføra tað betur, so hetta gevur okkum eisini betur stundir til tað, sigur Atli.

Mánadagin sigldu teir inn til Runavíkar og haðani frá heilt inn í Skálabotn. Veðrið var sera gott, men Atli sigur tó, at tað ikki var tað besta. Og hann letur stak væl at maskinunum.

– Tær vístu seg at vera stabilar og góðar. Sjálvt tá vit komu í nakað av sjaski við Hoyvíkshólmin eftir, at vit høvdu spælt okkum eina løtu á Kaldbaksfirði, bilti tað onki fyri maskinuna, sigur hann.

Teir sigldu so gott sum allan mánadagin á tamb á maskinunum. Teir fóru ikki av aftur teimum, fyrr enn klokkan leið móti hálvgum ellivu um kvøldið. Men tá vóru teir eisini deyðatroyttir.

– Vit brendu einar 70 litrar av bensini mánadagin, men hesin royndartúrurin var bara fyri, at vit skuldu læra maskinurnar at kenna. Vit fara sjálvandi at venja meira og gera onkran langan royndartúr afturat, sigur Atli S. Petersen. Og hann leggur afturat, at teir, nú teir hava roynt maskinurnar, eru nógv tryggari við túrin enn frammanundan, tí tær vístu seg at vera betur, enn teir høvdu væntað.

G-festivalur

Ein tílík verkætlan, sum teir báðir eru farnir í holt við, er ikki ókeypis. Og teir gera ymiskt fyri at útvega pening til hana. Millum annað hava teir í samstarvi við Kall upprættað eitt telefon nummar, 901500, har fólk kunnu ringja inn. Uppkallið kostar 50 krónur, men er so samstundis ein lutaseðil, har fleiri góðir vinningar eru at vinna. Millum annað ein Apex-ferðaseðil úr Føroyum til Danmarkar og aftur, ein fartelefon við talutíðar korti frá Kalli og nógvir aðrir vinningar eisini.

Harafturat verða hesar maskinurnar at síggja á G-festivalinum, sum verður í Gøtu vikuskiftið 18. –20. juli. Har fara fólk fyri ein bíligan penga at sleppa at royna maskinurnar. Ikki sigla sjálvi við teimum, men sita uppiá. Somuleiðis fara teir at hava vatnskíðir og sleipupútu við, so tey sum ikki hava hug at sita uppiá, kunnu royna okkurt annað við hesum maskinunum.

Yvirskotið av øllum, sum kemur inn til hesa verkætlanina, fer óskert til tey rørslutarnaðu.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	12
Nuuk	11
Qaqortoq	12
Ammassalik	13
Saint John's	18
Halifax	25
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	12
Lerwick	13
Aberdeen	16
London	21
Tromsø	14
Bergen	14
Oslo	--
Stokkhólm	23
Keypmannah.	17
Helsinki	19
Moskva	24
Berlin	18
Warzawa	19
Kiev	21
Bukarest	25
Paris	25
Madrid	30
Róm	27
Malorca	30
Athen	30
Malta	28
Tunis	32
Beijing	30
New Dehli	33
Bangkok	31
Jakarta	33
Sydney	16
New York	28
Miami	30
Los Angeles	22
Meksikobýur	21
Panama	30
La Paz	11
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	17

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 1010 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer í landnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 993 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og dýpist.



Í dag:
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað, men brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 07/07 kl. 06⁰⁰– 08/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,8°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,9 mm – mált frá 07/07 kl. 06⁰⁰–08/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 7,8 mm

VESTFALLSKYRRINDI

25. juni: Mánin longst frá jørðini
29. juni: Tendring
4. juli: Jørðin longst frá sólini
7. juli: Fyrra kvarter
10. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
9. juli	03.18	15.41	02.18	14.41	02.33	14.56	05.18	17.41	06.18	18.41	01.33	13.56	00.33	12.56	03.33	15.56	04.33	16.56	03.03	15.26	04.18	16.41
10. juli	04.05	16.30	03.05	15.30	03.20	15.45	06.05	18.30	07.05	19.30	02.20	14.45	01.20	13.45	04.20	16.45	05.20	17.45	03.50	16.15	05.05	17.30
11. juli	04.56	17.26	03.56	16.26	04.11	16.41	06.56	19.26	07.56	20.26	03.11	15.41	02.11	14.41	05.11	17.41	06.11	18.41	04.41	17.11	05.56	18.26
12. juli	05.56	18.30	04.56	17.30	05.11	17.45	07.56	20.30	08.56	21.30	04.11	16.45	03.11	15.45	06.11	18.45	07.11	19.45	05.41	18.15	06.56	19.30
13. juli	07.04	19.28	06.04	18.28	06.19	18.43	09.04	21.28	10.04	22.28	05.19	17.43	04.19	16.43	07.19	19.43	08.19	20.43	06.49	19.13	08.04	20.28

5 707265 100036 >